## Leikararnir gleða seg til dystin

Anna Hansen er mamma Einar, sum er ein av høvuðsstuðlunum á formula-liðnum hjá NSÍ og er nýggjur í landsliðshøpi. Hon sigur, at hóast fleiri av NSÍ-leikararunum júst hava leikt landsdyst, gleða teir seg rættiliga til dystin sunnudagin á heimavølli móti VB/Sumba. – Ikki tí, at teir halda, at hetta er ein avgreiðsluspurningur, sum eingin dystur í bestu deildini er, men tí, at spæligleðin veruliga er í hæddini. Sjálvandi vænti eg, at vit vinna, og vit vilja ógvuliga gjarna fáa FM-heitið avgreitt í hesum dystinum. Alt annað enn ein sigur kann ikki brúkast. Men man veit jú ongantíð. Anna sigur, at hon gleðir seg nógv til dystin, og tað verður ikki veðrið, ið forðar henni. – Eri eg ikki við fótbóltsvøllin sunnudagin, er tað heilt avgjørt tí, at eg eri sjúk, leggur hon aftrat. (-vilmund)



# Chiko er eisini klárur til

**- Tá ið eg fari inn á áskoðaraplássið og stilli meg á mítt pláss, havi eg nøkur "ritualir", sum eg fylgi og trúgvi upp á. Gongur ikki væl hjá okkara liði, stilli eg meg aftanfyri málið hjá mótstøðuliðnum, tí eg trúgvi, at bólturin kemur, har eg standi – altso í málið. Tað sigur Laura Olsen, NSÍ-fjeppari, sum treyðugt sigur okkum søguna um, tá hon einaferð í summar koppaði ein barnavogn í berum ovfarakæti aftanfyri málið hjá mótstøðuliðnum**




*Tey eru øll líka spent, 11 ára gamli sonurin Teinur, sum er í guligans-blusu, Laura – og Chiko, sum eisini er í NSÍ-búna og er nummar 12*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Meðan vit práta, gongur pekingesarin Chiko á gólvinum í NSÍ-búna. Hann er nummar 12, sum er nummarið hjá Einari Hansen. Aftast á rygginum er reklamumerkið EM-Asfalt*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**NSÍ-FJEPPARAR**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú NSÍ liggur nógv best fyri í kappingini um at vinna Formula-deildina og harvið gerast føroyameistarar í fótbólti, var Sosialurin í gjárkvøldið inni á gólvinum hjá Lauru og Jónsvein Olsen í Rytuvík, ið teljast millum tey, sum rættiliga kunnu sigast at vera NSÍ-fjepparar.

Øll í húsinum eru fjepparar og øll, sum eru løgst aftrat familjuni, eru eisini NSÍ-fjepparar – ja, sjálvt hundurin Chiko, sum gongur og melur á gólvinum, meðan vit eru á vitjan, er í bundnum gulum og svørtum NSÍ-búna.

Chiko hevur nummar 12 á rygginum. Tað er nummarið hjá Einari Hansen, sum er sonur Onnu og Svend Hansen í Saltangará. Á bringuni standa bókstavirnir NSÍ, og oman á rumpistykkinum aftan hevur hann eitt reklamumerki hjá E.M. Asfalt.

Einar er ein av stuðlunum á NSÍ-liðnum, sum nú er FM-heitinum nær, og hann er eisini nýggjur í landsliðshøpi.

### Bara fótbóltur

- Her verður næstan bara tosað um fótbólt, og vit eru ógvuliga spent, nú 5 stig eru á muni millum NSÍ og B36, samstundis sum bara tveir dystir eru eftir at leika.

Laura Olsen, sum vit skifta orð við, dylur ikki, at flest øll í Runavíkarøkinum eru ógvuliga spent til sunnudagin, tá NSÍ-liðið fer á vøllin ímóti VB/Sumba, sum kemur norður at spæla næst seinasta dystin í landskappingini.

- Eg vænti, at allir leikararnir hjá okkum fara út á vøllin at stríðast av øllum alvi, nú teir við at vinna á suðuroyarliðnum á heimavølli kunnu tryggja sær meistaraheitið í 2007.

Men, leggur Laura aftrat:

-Tað er eingin dystur vunnin, fyrr enn vit eru á odda, og dómarin hevur blást í floytuna fyri seinastu ferð.

Hon ivast onga løtu í, at skal NSÍ-liðið vinna sunnudagin, er neyðugt at allir leikarar taka dystin í størsta álvara, heilt frá byrjan.